## Eg meini tað



Rakel Helmsdal, rithøvundi

# Ein farri av stórbýi.....

Ja, hevði satt at siga okkurt sovorðið ordiliga álvarsligt mál, eg hevði ætlað mær at skriva um, okkurt sovorðið at øsa seg um, at verða sjokeraður av o.s.fr., men áðrenn eg skuldi seta meg við telduna, hendi nakað ótýdligt, ikki nakað stórt og ræðiligt á nakran hátt, bara nakað ótýdligt.

Havnin er broytt nógv hesi seinastu árini, ja, bara hesi seinastu trý eitt hálvt árini síðani vit stungu í sekkin og komu heim aftur til oyggjarnar.

Her í miðbýnum hava vit nú fleiri matstovur úr ymsum heimskrókum, vit kunnu frøa góman (fyri ikki at tala um búkin), við krásum úr Kina til Kolturs, úr Marokko til Mykinesar. Vit kunnu ganga á kafé um dagarnar og drekka cappucino og eta tertur ella pitabreyð, sum vóru vit í suðurlondum (ella bara í Keypmannahavn), og um kvøldarnar fara vit á pub og drekka irish cofée ella Pina Colada afturvið livandi jazzi ella "hyggepiano".

Spákar tú gjøgnum miðbýin eitt vanligt góðveðursvikukvøld, so ganga allastaðni fólk og smápráta. Fyrr var tað ikki fyrr enn um 2-tíðina vikuskiftisnætur, at býurin ýddi í fólki. Havnin hevur knappliga eftir nøkur heilt fáum árum fingið ein farra av stórbýi. Og tað er ein góður fjálgur farri, tí hann er jú tíbetur enn í rímiligum mátistokki, og verður neyvan ov stórur heldur.

Men, - so var tað handan lítla ótýdliga hendingin, sum onki hevði uppá seg, - og tó....... Tað, sum hendi, var, at eg traðkaði í ein, - ja tit kunnu sjálvi hugsa tykkum hvat, - beint undir mínum snóratræi, har eg skuldi til at hanga nývaskaði vælangandi seingjarklæðir upp. Við stórbýarfarranum er nevniliga nakað annað komið, sum tey flestu helst vildi verið fyri uttan. Í stórbýum (ið vegna hóskandi støðd kunnu loyva sær at nýta hetta heiti) er eitt fólkaslag, sum ikki kann fara út at spáka einsamalt, men noyðist at hava ein hund sum umbering til at flyta apostlarnar. Ikki at eg á nakran hátt havi nakað ímóti, at fólk hava húsdjór, men húsdjór valdast. Hundur er ikki eitt djór, sum hugsar nakað stórvegis um reinføri á gongubreytunum og grasvøllunum o.s.fr. Alt í lagi, ein einstakur hundalortur á gongubreytini av og á, tað doyr ongin av, men tá tað, sum nú, er vorðið neyðugt altíð at hyggja niðurfyri seg, tá tú gongur til og frá arbeiði, so at tað ikki longur ber til njóta útsýnið, og einar 4-5- ferðir á 15 minuttum stutta teininum oman úr barnagarðinum, ert noydd til at biðja sonin ansa sær fyri lortum, ja, so........... Aðrastaðni hava tey loyst hendan trupulleikan við antin at geva hundaeigarunum bót, um tey ikki samla lortin upp og taka hann við sær, ella sett fólk at koyra runt á motorsúkklum og samla inn.

Men alt gott um hundar annars...... Tað einasta eg komi at hugsa um, sum ger meg eitt sindur minni álvuliga við hesum stórbýarfarranum, tað er hetta, sum eg varnaðist í Danmark: Tað var vorðið vanligari hjá fólki at ganga túr við hundum sínum, enn við børnunum. Vóni ongantíð vit vera so stórbýarkend, at vit fara at síggja gøturnar millum kaféeirnar og matstovurnar yvirsáddar við hundalortum, í staðin fyri foreldum við prátandi børnum...........

# Ernst á sanganna veingjum

Føroyski operasangarin Ernst Dalsgarð hevur fingið góð ummæli í donskum bløðum fyri sín høvuðsleiklut herfyri

*Heri Eysturlíð*

Í vár hevur føroyski tónleikarin Ernst Dalsgarð havt úr at gjørt. Ikki sum floytuspælari hesaferð, men sum høvuðsleikari í operuni L'elisir D'amore (Kærleiksdrykkurin), ið varð framførd á Den Ny Opera í Esbjerg. Tey góvust at spæla operuna fyri fjúrtan døgum síðani, tá ið ensemblið sum eitt slag av "finalu" ferðaðist kring Danmark og framførdi „Kærleiksdrykkin".

Ensemblið fekk sera góð ummæli í donskum bløðum, serliga fyri tað leiklistarliga. Annars bóru Ernst Dalsgarð og leikstjórin ótta fyri júst hesum partinum av operuni, eftirsum Ernst ikki hevði fingist so nógv við leiklist áður.

Vanliga starvast Ernst Dalsgarð sum kórsangari í Det Kongelige Danske Operakor, so alt várið hevur hann ferðast ímillum Keypmannahavn og Esbjerg at venja.




**Ensemblið fekk sera góð ummæli í donskum bløðum, serliga fyri tað leiklistarliga. Annars bóru Ernst Dalsgarð og leikstjórin ótta fyri júst hesum partinum av operuni, eftirsum Ernst ikki hevði fingist so nógv við leiklist áður.**

**Spennandi uppgáva**

Í heyst bjóðaði Den Ny Opera til sangarakapping fyri at finna tær røttu røddirnar til hesa vælumtóktu operu.

- Aftaná kappingina fekk eg at vita, at teir høvdu verið sera glaðir fyri røddina hjá mær. Men ein annar tenorur, góði vinmaður mín Helge Rønning, fekk leiklutin. Hann hevði, umframt eina góða rødd, gingið fýra ár á operaakademinum, greiðir Ernst Dalsgarð frá.

Men tá ið Helge Rønning so fekk forfall, setti Den Ny Opera seg í samband við Ernst, og hann var ikki seinur at taka av.

- Millum annað tí, at leikluturin sum Nemorino (høvuðsleikluturin, red.) er ein sera vælumtóktur leiklutur millum tenorar. Ein strævin, men spennandi uppgáva, sigur Ernst Dalsgarð.

**Seta stór verk upp**

Den Ny Opera varð sett á stovn fyri uml. fimm árum síðani og hevur tvey tey seinastu árini fingið fíggging frá danska statinum og Ribe Amt. Hetta ger, at tey kunnu løna fólki og seta stór verk upp.

Den Ny Opera heldur til í tí nýggja musikhúsinum í Esbjerg. Musikhúsið er bara 3 ára gamalt, og kendi arkitekturin Utzon hevur teknað. Húsið er stórt, og pláss er fyri umleið 1200 áhoyrarum.

Pallurin á Den Ny Opera er líka stórur sum tann á Tí Kongaliga, so Ernst Dalsgarð heldur ikki, at tað var nógv ørðvísi at syngja har.

**Tveir tenorpartar ísenn**

Pálmasunnudag og Skírishósdag fer Ernst Dalsgarð at royna seg bæði sum evangelistur og tenorsolistur í Johannespassiónini.

- Vanliga eru tveir um at syngja tenorpartarnar, men mær hevur altíð dámt væl at vita, hvat eg kann klára, so eg royni bæði. Sera spennandi og bílligari hjá kórinum, sigur Ernst Dalsgarð.

Alt summarið hjá Ernst fer við einari nútímans operu sum verður framførd á „Den Anden Opera" í Keypmannahavn, ið hevur lagt seg eftir at bara seta nútímans operur upp. Danski tónasmiðurin Anders Brødsgaard hevur skrivað tónleikin. Anders Brødsgaard undirvísti í klaverspæli við gamla Tórshavnar Musikkskúla miðskeiðis í áttatiárunum.

2 árin
**Tíðindablaðið Sosialurin**. **Postadressa:** Postboks 76, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720.
**Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjórn:** Eyðun Klakstein.
**Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Egg bera boð um vár og lív



PÁSKAREGG: At rulla páskaregg er kanska serføroyskur siður. Men hvat hava páskirnar og egg við hvørt annað at gera? Egg er lív og talan er um sera gamla várveitslu. - Páskaveitslan er sera gomul og er enntá eldri, enn kristindómurin. Á enskum eitur tað t.d. Easter, ið kemur av eystur. Í eystri, har sólin rísur, og so eru vit jú aftur í súmbolikkinum við lívi, greiðir fólkalívsfrøðingurin Eyðun Andreassen frá.

*Dagfinn Olsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Umframt tað, ið vit hava lært í bíbilsøgu, so seta vit páskahátíðina í samband við egg, Tað gera børnini í hvussu er í stóran mun.

Prýtt verður við eggum og egg verða prýdd. Eisini rulla vit egg.

Vit hava sett fólkalívsfrøðinginum Eyðun Andreassen stevnu - eitt slag av páskastevnu - fyri at fáa hann at greiða nærri frá, hví eggini hava nakað við páskirnar at gera.

- Tað verður hildið at vera tí, at tað nærkast vári. Tað fer at vaksa, grógva, og lív kemur í. Egg er lív.Tað er upprunin til lívið, sigur Eyðun Andreassen, ið her sipar til, at talan er um eitt slag av veitslu til frama fyri tí fruktagóða.

**Gamal siður**

– Páskirnar fella seint á vári. Hetta er gamal vársiður í Miðeuropa. Í Miðeuropa er várið í besta blóma, sólin skínur og genturnar ganga berklæddar á gøtunum og alt er gott. Fyrr var gamal siður at senda børnini út í skógin, ella hagan, at leita eftir fyrstu eggunum. Eggini vórðu etin. Egg er góður matur, eftir ein langan og strævnan vetur, sigur Eyðun Andreassen.

**Hara verpur ikki egg**

– So er tað hetta við páskareggunum, sum vit kenna tey í dag. Hetta er komið frá teim gomlu siðunum í býunum. Býirnir eru stórir og har er ongastaðni at senda børnini út at leita eftir eggunum. Tí funnu fólk uppá at finna egg og bera tey inn, so børnini funnu tey páskamorgun. Hetta varð skipað á onkran hátt. Síðani er tann søgan komin, ið er vanlig sunnan fyri okkum, har tey tosa um páskaharuna, greiðir Eyðun frá.

– Tey funnu uppá at siga, at haran kom við eggunum, men hara verpur ikki egg. Men haran var vanligt dýr, ið kom inn í býirnar. Onkrastaðni verður kaninin nýtt, sigur Eyðun Andreassen.

- Páskaharan varð eisini etin. Tað er óivað ein grund til páskaharuna. Haran var kanska einasta villa kjøti, sum tey fingu í býunum. Haran, ella kaninin, kom við eggunum og bleiv so etin. Ein má minnast, at sum teir stóru býirnir blíva til í Miðeuropa, so vantaði eitt, nevniliga flutningsmøguleikar. Fólk, ið føddust har, komu ikki út úr býnum. Størri býurin var, verri var. Tað var jú eingin stuttur teinur at fara til gongu. Hugsa sær at fara til gongu út á landið av Ráðhúsplássinum í Keypmannahavn, hugleiðir Eyðun Andreassen, ið ikki avvísir, at í kanin og haru liggur eisini ávíst súmbol um nakað fruktagott.

**Litir**

– Seinni hava fólk funnið uppá at lita eggini, fyri at fáa veitslurómin við. Í okkara tíð hevur ídnaðurin so tikið yvir og er farin at framleiða egg, ið einki hava við egg at gera, uttan kanska tað, at formurin er hin sami, sigur Eyðun Andreassen.

Seinni er hin guli liturin komin sum páskalitur. Hann kemur óivað frá blómuni, ið vit nevna páskalilja, ið er millum fyrstu blómurnar, ið blóma, sigur Eyðun Andreassen, ið metir liljurnar sum vártekin, ið fólk gleða seg til.

**Serføroyskt at rulla egg**

Eyðun Andreassen dugir ikki neyvt at siga, um siðurin við at rulla páskaregg er serføroyskur, ella um hann stavar aðrastaðni frá. Hann er tó ikki kendur aðrastaðni um okkara leiðir, staðfestir Eyðun, sum m.a. hevur kagað í íslendskar heimildir, har einki er at finna um hetta.

- Fólk hava so funnið uppá eitt spæl. At rulla eggini oman eina brekku, til tey brotna, og so eta tey. So eru ymisk ráð, fyri at fáa eggini sterkari. Tey kunnu kókast í saltløgi ella í kaffi. Ofta fara familjur út at rulla egg og í dag gera kanska eisini barnagarðar nógv burturúr páskareggum, sigur Eyðun Andreassen.

**Eldri enn kristindómurin**

Páskaveitslan er sera gomul og er enntá eldri, enn kristindómurin.

- Hetta við eggunum er sera gamal siður. Ein várveitsla. Navnið páskir kemur úr kristindóminum, úr hebraiskum og latíni. Á týskum og enskum eitur tað jú ikki páskir. Á enskum eitur tað t.d. Easter, ið kemur av eystur. Í eystri, har sólin rísur, og so eru vit jú aftur í súmbolikkinum við lívi, greiður Eyðun Andreassen frá.

- Sum kristin veitsla, hava vit yvirtikið páskirnar frá jødadóminum. Stórhendingin eru jú páskalambið, ið er jødiskur siður, ið vit eisini kenna frá útlegdini í Egyptalandi, sigur Eyðun og minnir á bíbilsøguna, har jødar fingu boð um at slakta eitt lamb og smyrja blóðið á durastavin, so soldátarnir lótu tey, ið har búðu, sleppa við lívinum.

- Hetta er elligamal jødiskur siður, kanska eldri enn tað eisini, og so er hetta komið inn í kristindómin. Vit halda jú skírisdag til minnis um heilagu kvøldmáltíðina, krossfestingina langa fríggjadag og uppreisnina fyrsta páskadag. Hetta er so blandað við gomlu várveitsluna í Europa. Sostatt hava eggini ikki religiøsan týdning, men eru til heiðurs fyri tí fruktagóða, sigur Eyðun Andreassen at enda í frágreiðing síni um siðin við páskareggum um páskirnar.